# Obama til Saudiarabia

Hvítu Húsini í Washington hava kunngjørt, at Barrack Obama, forseti, fer til Saudiarabia í næstu viku. Obama hevur fleiri mál við sær, men høvuðsørindini eru at tosa við saudiarabisku leiðsluna um kjarnorkuverkætlanina hjá iranum. Eitt annað týðandi mál á dagsskránni er, hvat skal gerast fyri at fáa gongd á friðarsamráðingarnar millum Ísrael og palestinar. Eygleiðarar halda, at Obama eisini ætlar sær at tosa við saudiarabisku leiðsluna um altjóða oljumarknaðin. Saudiarabia er heimsins størsti oljuútflytari.



# Blóðtrot forðar viðgerðum

Skurðlæknarnir á sjúkrahúsinum í svenska býnum Uppsala noyddust í gjár at avlýsa 15 skurðviðgerðir, tí ov lítið blóð var á blóðgoymsluni hjá sjúkrahúsinum. Leiðslan á sjúkrahúsinum sigur, at hetta er fyrstu ferð í fleiri ár, at læknarnir hava verið noyddir at útseta skurðviðgerðir orsakað av blóðtroti. Serfrøðingar siga við svensku tíðindastovuna TT, at tann óvanliga støðan kemst av, at læknarnir eru førir fyri at gera altsamt fleiri skurðviðgerðir, sum krevja blóð. TT veit eisini at siga, at støðan er næstan tann sama á øðrum svenskum sjúkrahúsum.





*Vognar kunnu eisini nýtast, tá hjóldagar eru*





*Varaleiðarin, Julianna á Geilagarði, millum fittu børnini á ítróttarbarnagarðinum*





*Frukt er fastur partur av matskránni á ítróttar-barnagarðinum á Svangaskarði*

